# Kommunur spentar uppá fótbólthøllina

**Arbeiðið við at fáa stuðul til ætlaðu fótbólthøllina í Skálafirði gongur sum ætlað. Fleiri kommunur í Eysturoynni siga seg vera hugaðar fyri ætlanini.**

Kommunur
*Snorri Brend*


*Fótbóltshøllin í Skálafirði fer at taka seg vakurt út í landslagnum*

**Skálafjørður:** Um – ella tá – ætlaða fótbóltshøllin í Skálafirði gerst veruleiki, verður Runavíkar kommuna ein av kommununum í ætlanini.

Hetta er ein stórfingin ætlan um ein innandura fótbóltsvøll við øllum tí, sum hartil hoyrir. Eftir ætlanini er tann kommunali parturin 16 mió. kr.

Av hesum er parturin hjá Runavíkar kommunu góðar 3,6 mió. kr. Á fundi í farnu viku samtykti býráðið at taka undir við hesi ætlanini.

Samtykt varð, at kommunan skal rinda sín part í ætlanini yvir 15 ár, og svarar hetta til góðar 242.000 kr. umframt renturnar.

**Leirvíkingar við**

Í fleiri øðrum kommunum í økinum verður arbeitt við hesi ætlanini, og fleiri aðrar kommunur eru somuleiðis positivar mótvegis fótbóltshøllini.

Millum hesar er Leirvíkar kommuna, sum á fundi herfyri hevði hetta málið til viðgerðar á bygdarráðsfundi.

Fíggjarnevndin í kommununi hevur í høvuðsheitum tikið undir við, at Leirvík verður við í ætlanini, og hetta samtykti bygdarráðið eisini.

# Bikarar hittast í Skálafirði

**Bert eitt ár eftir at kristiliga motorsúkklufelagið "Holy Riders MC Føroyar" varð sett á stovn standa tey á odda fyri stórum tiltaki í komandi viku.**

Motorsúkklur
*Snorri Brend*

**Skálafjørður:** Hetta er fyrstu ferð at ein slík motorsúkklustevna verður hildin á føroyskari jørð.

Á stevnuna koma kristnir bikarar úr Norðurlondum, umframt úr í tí føroyska felagnum, sum í dag telur um 20 limir.

Útlendsku gestirnir koma til Føroyar við Norrönu mikudagin í næstu viku, og tá verður móttøka í Gamla Kommunuskúlagarðinum, har borgarstjórin Heðin Mortensen býður teimum vælkomnum.

Fríggjadagin í næstu viku byrjar so stevnan í Kelduni í Skálafirði. Her er ætlanin at bikararnir skulu hugna sær, men tað andaliga verður somuleiðis raðfest sera høgt.

Á stevnuni verður leygardagin skipað fyri stórari gospelkonsert í Kelduni, har Eyðun Jacobsen v/ familju, Magni Christiansen, Sofus Hansen og systrarnar Vanja, Laila og Barbara luttaka.

# Steðgaður av íslendsku sjóverjuni

**Sancy varð í gjárkvøldið steðgaður av íslendsku sjóverjuni, tá hann var staddur í ein landsynning úr Íslandi. Hann er nú á veg til lands við monnum hjá íslendsku sjóverjuni umborð.**

Fiskivinna
*Snorri Brend*

**Ísland:** Trolarin var í gjárkvøldið staddur 130 sjómíl úr Eystara Horni, tá mans frá sjóverjuskipinum Óðinn óvæntað komu umborð, helst fyri at kanna reiðskap og veiðu, og kanska eisini fiskileið.

Sambært íslendska blaðnum Vísir hevði skiparin hug at sigla undan íslendsku sjóverjuni. Men at enda eydnaðist kortini íslendingum at fáa menn settar umborð á skipið, tá teir komu hagar við tyrlu og umborð á trolaran við gummibáti teirra.

Menninir frá íslendsku sjóverjuni eru sum vera man framvegis umborð á trolaranum, sum – seinastu vit frættu – var ávegis til íslendska býin Eskifjørð.

Teir vænta at vera inni seint seinnapartin í dag, tá málið síðani skal viðgerast.


*Menn frá íslendsku sjóverjuni ávegis umborð á Sancy í gjárkvøldið*

*Mynd: Landhelgisgæslan*

**Ongin viðmerking**

Sum skilst hevur Sancy roynt nærhendis gráu sonuni. Tí er tað helst ein spurningur, hvar trolarin heilt nágreiniliga hevur verið til fiskiskap.

Tað er helst hesin spurningin sum ein rættur í landi skal taka støðu til.

Tað er Moyggjartúgva í Vági sum eigur Sancy. Tá vit bóðu Mikkjal Sørensen, reiðara um viðmerkingar segði hann seg ongar viðmerkingar hava til málið.

Skiparin umborð hevði heldur ikki hug at úttala seg, fyrrenn málið hevði verið fyri í rættinum.

Nevnast kann, at Sancy hevur áður verið heimahoyrandi í Íslandi. Hann æt tá Hvannaberg, og var tá heimahoyrandi í Ólafsfirði.

STUTT SAGT

## Bjóða Fiskivinnuskúlan út í Vestmanna

Umsíðir er líkt til at vestmenningar og onnur fiskivinnuáhugað kunnu síggja fram til, at ein nýggjur fiskivinnuskúli gerst veruleiki.

Arbeiðið uppá henda skúlan í Vestmanna, har verandi skúli eisini er, verður nú boðið út.

Arbeiðið verður boðið út sum stórarbeiðstøka og sum fakarbeiðstøka. Lisitasjónin verður 24. august.

Kostnaðurin er mettur til einar 22 mió. kr. og skal nýggi skúlin verða liðugur seinast í komandi ári.

*sb.*

## Nýggjan bátahyl í Leirvík

Nú er líkt til at umstøðurnar hjá báteigarum í bygdini gerast munandi betri í framtíðini.

Bygdarráðið hevur nevniliga samtykt, at heita á Landsbyggifelagið um at gera eitt uppskot av bátahylinum inni á Toftanesi. Í hesum sambandi skal somuleiðis gerast eitt uppskot um nýggja atløgusíðu.

Samtykt varð at játta 150.000 kr. til hesa planleggingina av havnarøkinum. Peningurin verður tikin av innistandandi.

*sb.*


*Nýggja røktarheimið í Vestmanna skal liggja á Follendi og verður liðug um 2 ½ ár*

*Mynd: Vestmanna.fo*

## Nýtt røktarheim um hálvttriðja ár í Vestmanna

Nú er klárt hjá vestmenningum at fara undir bygging av einum røktarheimi í bygdini.

Herfyri boðaði nevniliga Almanna- og Heilsumálaráðið kommununi frá, at ráðið vil stuðla ætlanini at byggja røktarheim í bygdini.

Stuðulin til byggingina er 12 mió kr. Tað verða 24 pláss tøk á heiminum, sum eftir ætlan skal byggjast á staðnum teir nevna Follendi.

Vestmanna Kommuna hevur haraftrat gjørt avtalu við Kvívíkar Kommunu um felags bygging. Henda avtala inniber, at Kvívíkar Kommuna fær rættin at brúka ein triðing av plássunum á heiminum.

Í ætlanini er eisini eitt dagtilhald knýtt, sum kommunurnar tó ikki gjalda fyri sjálvar. Her er ein áhugabólkur sum hevur tikið stig til hetta.

Ætlanin er at røktarheimið skal verða klárt at taka í nýtslu um ársskiftið 2008/09, upplýsir Vestmanna kommuna.

*sb.*